# Alcoa kannast fyri mutur

Amerikanska aluminiumsfyritøkan Alcoa, sum samstarvar við grønlendska heimastýrið um byggja eitt stórt aluminiumsverk í Grønlandi, er nú undir illgruna fyri mutur. CNN veit at siga, at ákæruvaldið hevur biðið ein dómstól leggja sak ímóti Alcoa, sum skal hava brúkt mutur fyri at fáa avgerandi ávirkan á eitt stórt aluminiumsfelag í Bahrain. Sagt verður, at málið byrjaði longu í 1993, og at Alcoa hevur goldið næstan 10 mia. krónur í mutri síðani.



*Alcoa skal hava mutrað embætismenn og politikarar í Bahrain (Mynd: KNR)*



*Nýggja høllin hjá Sea Star Contractors inni á Rætt, sum verður karmur um elementvirksemi og bilaverkstað*

Mynd: Vilmund Jacobsen

ur, at teir eru sera spentir upp á hetta virksemi, ið teir vænta kemur at geva felagnum stórar møguleikar.

- Vit hava arbeitt við hesum hugskoti í eini tvey ár, og í summar stendur byggihøllin liðug.

Hann sigur, at Sea Star Contractors við hesum verður heildarveitari av betongi og betongarbeiði.

- Vit fara serliga at leggja okkum eftir sethúsamarknaðinum. Í høllini fara vit at stoypa elementir til sethúsagrundir og dekkelementir, samstundis sum vit kunnu fara út í økini við nýggjum og nútímans forskallingum, ið vit keyptu til arbeiði í Hovi.

Jan vísir á, at viðskiftafólk fara at kunna velja, um tey vilja hava grundina úr elementum, sum verða stoypt í høllini – ella, um tey ynskja, at grundin verður stoypt upp á staðnum.

- Í høllini kunnu vit stopa elementir til einar 2-3 grundir um vikuna, og nýggju forskallingarnar eru so stórar, at vit við teimum kunnu stoypa einar tríggjar ymiskar sethúsagrundir á staðnum í senn.

## Betong úr hádygd

Sea Star Contractors hevur eisini keypt eina nýggja, nútímans og teldustýrda betongblandistøð, sum felagið hevur brúkt í Hovi. Hendan stendur nú inni á Rætt og verður brúkt í framleiðsluni av betongelementum og betongdekkum.

- Við nýggju støðini fáa vit betong av hágóðsku, har øll blandingin verður púra eins. Viðskiftafólk fáa ta blanding av betongi, tey vilja hava. Útprint verður av hvørji blanding, eins og laboratoriuroyndir verða gjørdar undir øllum arbeiðnum.

Jan sigur, at felagið longu nú er farið undir framleiðslu av dekkelementum úr betongi, og hann væntar, at teir kunnu lata tey fyrstu elementini til sethúsagrundir innan heilt stutta tíð.

Áðrenn byggihøllin er liðug og klár at taka í nýtslu, stoypir felagið dekkelementini uttandura.

- Ætlandi verður okkara lutur eisini at seta elementini upp fyri viðskiftafólk, og fyrimunirnir við elementum er, at ein sethúsagrund kann koma upp at standa eftir einum ella tveimum døgum – alt eftir, hvussu væl fyrireikingararbeiði er gjørt.

Stjórin í Sea Star Contractors sigur, at ein annar fyrimunur við elementunum er, at tey eru púrasta sløtt, tí tey verða stoypt á borðum við stálplátum liggjandi undir.

## Kappingarførir prísir

- Vit vænta, at prísmunurin á eini sethúsagrund úr elementum og eini grund, sum verður stoypt á staðnum, verður lítil ella eingin, og tað er eingin ivi um, at vit fara at vera kappingarførir á marknaðinum, sigur Jan Danielsen.

Á nýggja elementvirkinum og bilverkstaðnum fara væntandi eini 10 fólk at arbeiða.

# Fiskaprísir í fríum falli

**Prísirnir á eitt nú hýsu og svartkalva hava verið vánaligir seinastu dagarnar. Hinvegin er upsaprísurin batnaður aftur og er rímiligur, eins og prísurin á stóra toskinum heldur sær væl**

FISKAPRÍSIR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyri summi fiskasløg er føroyski fiskamarknaðurin ógvuliga viðbrekin, tá ið nógvur fiskur kemur upp á land. Tað er skjótt, at fiskaprísirnir verða ávirkaðir, og hetta sóu línumenn ikki minst í gjár, tá ið trý línuskip landaðu í Klaksvík.

Ein av bátunum, sum legði veiðina upp í gjár, var línuskipið Klakkur. Teir høvdu eini 80.000 pund, men tá ið vanliga sølan var av, høvdu teir bert selt eini seks tons.

Tvey onnur línuskip landaðu eisini í Klaksvík í gjár. Kvik hevði eini 60.000 pund, og Grani hevði umleið somu nøgd.

Sosialurin hevur skilt, at eftir vanligu søluna á Fiskamarknaðinum mánamorgunin, stóðu heili 100 tons av hýsu eftir, sum ikki vóru seld.

Vanligt er, tá ið fiskur verður boðin út á marknaðinum, at seljarin ásetir ein minstaprís. Men Fiskamarknaðurin kann eisini sjálvur áseta ein minstaprís, so kappingin um fiskin byrjar á einum ávísum krónutali fyri kilo.

Hví júst dagurin í gjár var so vánaligur hjá teimum, sum høvdu hýsu, er ilt at siga, men millum keyparar, sum pakka og selja heilan fisk av landinum, skilst, at umstøðurnar til flutning av landinum væl kundu verið betri, enn tær eru.

Tað hevur ikki eydnast okkum í morgun at fáa fulla greiði á, hvørji fiskasløg serliga hava verið fyri prísfalli í seinastuni, men eitt annað fiskaslag, sum er fallið nógv í prísi seinastu dagarnar, er svartkalvi.

Línuskipið Ågot legði herfyri um frá línuveiði til garnaveiði. Tá ið umleggingin fór fram, lá prísurin á svartkalva millum einar 18 og 24 krónur, men nú skipið landaði á øðrum túri, fingu teir bert einar 14-15 krónur í miðal fyri kilo.

Keldur innan fiskakeyp og fiskasølu siga, at prísirnir á upsa ikki eru av leið í løtuni.

Prísirnir fullu nakað herfyri, men eru síðan komnir uppeftir aftur, og í dag liggur miðal upsaprísur um einar 5 krónur fyri kilo, sum soleiðis er á góðari leið fyri hetta fiskaslag.

Orsøkin til, at upsaprísurin ikki er serliga nógv ávirkaður av gongdini annars, er, at rímiliga góður og støðugur marknaður er fyri frystu upsavørurnar.

Hinvegin er prísurin á hýsu og eitt nú svartkalva nógv ávirkaður av, hvussu møguleikarnir eru at fáa fiskin av landinum – og soleiðis eisini av fiskaprísunum uttanlands.

Hóast fall hevur verið í prísinum á fleiri fiskasløgum, hevur toskaprísurin hildið sær væl – í hvussu er á tí stóra fiskinum.

Í gjár seldi Fiskamarknaður Føroya tosk 1 fyri 25,30 fyri kilo, meðan toskur 2 fór fyri umleið 25 krónur fyri kilo. 3'arin helt sær eisini væl í prísi og fór fyri einar 18-20 krónur fyri kilo. Í aðrar mátar er toskur 4 fallin nógv í prísi, skilst.



*Ymiskt er, hvussu fiskaprísirnir halda sær. Summi fiskasløg eru meira viðbrekin enn onnur*

Mynd: Vilmund Jacobsen